DAGSINS MEINING

Bókin og løgmaður

Nú um dagarnar kom út bók, sum hevur fingið sjáldsamar dimentiónir í Føroyum. Ja eftir tí sum skilst, er tað ikki hent áður, at ein nýggj bók hevur fingið so nógva umtalu, og at gravgangurin eftir nýgjari føroyskari bók hevur verið so stórur millum manna. Og tað er kanska heldur ikki so løgið, tá hugsað verður um innihaldið. Um at tveir journalistar hava gravað fram tað teir siga eru prógv um, at Føroya løgmaður, tá hann var bókhaldari fyri meira enn 20 árum síðani, rættaði í tølunum í bókhaldinum fyri virki í Norðoyggjum. Hetta er eitt mál, sum fleiri ferðir áður hevur volt høvuðbrýggj og tað verri er, eina samgongukreppu. Løgmaður sigur nú, at skuldsetingarnar móti sær, hava einki at siga, tí málið er úti av verðini. Semja varð gjørd um, hvussu hetta málið skuldi handfarast og endi fáast á tí.

Teir báðir rithøvundarnir vilja við síni bók siga lesarunum tvs. Føroya fólki frá, at alt langt frá fór rætt fram í málinum á sinni. Teir siga seg eisini hava fingið nýggj prógv á borðið, sum eru so avdúkandi, at tey eiga at fáa avleiðingar fyri løgmann.

Tað nýggja, sum er komið fram í bókini, og sum vit øll so ella so mugu taka til viðgerð ella til stoðutakan, er tað, sum stendur um, at Anfinnur Kallsberg skal sjálvur hava rættað í tølunum, tá hann varð bókhaldari. Eitt er tað, at tú lænir av kassanum og leggur ein seðil í og sigur, at tú hevur lænt av kassanum, men um ein regulert fer inn og rættar - "forfalskar" - nøkur dokument, sum er boðskapurin í bókini, tað er nýtt í okkara verð. Hetta er ein sera grov ákæra, og er ein kardinalsynd hjá einum bókhaldara, um tað er sætt, at tað er rættað í tølunum. Tað verður sagt, at formansskapurin í tinginum tók hetta málið fram í 93, men spurningurin er, um hann hevur vitað, at tað vóru so graverandi umstøður galdandi tá, sum rithøvundarnir nú leggja upp til í bókini "Skjót Journalistin".

Hvat skal nú henda spyrja øll. Bókin er sambart útvarpinum longu vorðin ein bestseljari og sohvørt fólk hava lisið hana kann verða spurt, hvat nú! Vilja fólk tvs. veljararnir og her ikki minst veljararnir hjá samgonguni og teirra umboð á tingi hava, at hetta skal fáa avleiðingar fyri løgmann?

Sagt verður at málið er fyrnað, men vit mugu ikki gloyma, at eitt mál fyrnar ongantíð moralskt. Kanst tú hava persón sitandi í løgmansembætinum, sum í síni fortíð hevur framt dokumentfalsan – um so er, at tað, sum verður lagt upp til í bókini, er sætt. Vit spyrja. Hvat siga t.d. tey 53% í Tjóðveldisflokkinum, sum hava sagt Anfinn Kallsberg vera besta boð uppá løgmann.

Moralurin vil sjálvandi vera tann, at hevur veljarin einki ímóti, at hetta er hent, sum verður avdúkað í bókini, so kann einki gerast við málið. Tá er tað demokratiið, sum velur. Hetta er ikki ein juridiskur spurningur longur, tí málið er fyrnað. Nú er tað ein spurningur um moral og politikk, um hvønn vit vilja hava at standa á odda fyri landinum – um hvat hald er í skuldsetingunum, hvussu og um hesar skulu viðgerast aftur og um tær skulu hava avleiðingar við sær.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Romantisk guðsdyrkan við bíbliuversum

John S. Myllhamar

"... alt tað, sum tit biðja um í bønini við trúgv, tað skulu tit fáa..." *Punktum*. "Verið altíð glaðir!" *Punktum*.

Á, den romantikkur at vera bíbliuvers-kristin. Men týðiliga skínur gjøgnum hesa boðan, hvussu grunn hon er, at vit skulu taka bókstaviliga allar reglurnar í Bíbliuni, sum okkum dáma, og, sum hóska til okkara ynski. Bið, og tú fært alt, "alt" skal veruliga skiljast sum alt:

Hvít skínandi jetflogfar
verður tær veitt,

fýra-stjørnu hotel, úr himli
tær tveitt,

grøðing fyri allar sóttir,
vælferð, succes og
mjúkastu mottur.

Guð gongur øllum ynskjum á møti. Hvør tørvur verður nøktaður, bara vit eru borðfull av trúgv. Tú fært alt, sum tú biður um, eins og barni, sum fær alt eftirlæti.

Einastaðni stendur, at mangir svikakristusar skulu stíga fram. Altso, eita teir kristusar - ?

Verið altíð glaðir! *Punktum*. Tvingi tykkum til altíð at síggja glaðir út! Beri forlorna tannpastasmíli, líkamikið hvat er áfatt! Flenni, og síggi glaðir út undir jarðarferð, tá ið hini gráta og syrgja! Syrgið ikki við teimum! Tvingi tey við orðum Paulusar: Verið altíð glaðir! Ver glaður tá ið tú missir tíni kæru! Ver glaður tá ið børn tíni fremja brotsgerðir! Ver glaður tá í tú gerst sjúkur! Ver altíð glaður, tí tað stendur í einum bíbliuversi! Verið ikki realistisk! Granski ikki djúpari í skriftini hvat veruliga verður meint við, tí tá kunnu tit oyðileggja romantikkin!

Á, det grunnskygni.

Eitt typiskt dømi ikki bara fyri at koma uttan um veruleikan og dýpdina, men hvussu grunt guðsdyrkanin stingur hjá nøkrum menniskjum, er lesiháttur Jón Ellendersen brúkar, tá ið hann í Dimmalætting viðvíkjandi eini prædiku hjá Emil Olsen, heldur enn at lesa hvat prestur segði, og í hvørjum høpi tað var sagt, fokusserar uppá endurgevingar av journalistum, og síðani fer heilt útav sporinum.

Freistarin var sniðfundigur. Hann vísti eisini á Guðs lyftir, hann endurgav bíbliuvers, tá ið hann bað Jesus stoyta seg oman úr torninum á halgidóminum, enntá siteraði hann brot úr vakra og lyftiríka sálmi 91 hjá Dávidi: "Einglum sínum man hann geva boð um teg, og á hondum munnu teir bera teg at tú ikki meiðir fót tín á nøkrum steini!" Men freistarin er lygnarin, eisini tá ið hann endurgevur brot úr sannleikanum.

Jú, tað eru sannleikar í lygnini, men tað er eingin lygn í sannleikanum.

Eingin verður ríkur av tølum

Helgi Abrahamsen

Høvuðsendamálið við løgtingsfiggjarlógini er at avgera, hvussu almennir pengar skulu brúkast. Í figgjarlógini eiga at standa allar tær útreiðslur, sum roknað verður við, at landskassin fær í árinum, sum figgjarlógin er galdandi fyri, men av tí at óvæntaðar rokningar eisini kunnu koma sum árið líður, stendur møguleikin eisini opin fyri eykajáttanarlógum. Hesar skulu gera tað møguligt at gjalda rokningar, sum eingin visti nakað um, tá figgjarlógin varð samtykt.

Til september 2001 vóru allar eykajáttanarlógir, roknaðar í bruttovirði. Tað vil siga, at tingmenn fingu bara at vita, hvussu nógv útreiðslurnar vóru broyttar, meðan broytingar á inntøkusíðuni vóru ikki taldar við.

Frá brutto til netto

Men við eykajáttanarlógini fyri september 2001 kom broyting í. Nú vóru inntøkurnar eisini tiknar við í roknistykkið, og tí fóru tingmenn at tosa um eykajáttanarlógir sum í besta føri kundu hava avlop.

Í roynd og veru hevði hetta einki við veruleikan at gera, tí tað eru bara útreiðslurnar, sum Løgtingið kann gera nakað við. Inntøkurnar eru sum tær eru, líkamikið um uppskotið til eykajáttanarlóg verður samtykt ella felt.

Búskaparliga vóru tíðirnar góðar í 2001, og inntøkurnar hjá landskassanum øktust dag frá degi. Tá so talt varð saman, hvussu nógv eykajáttanirnar gjøgnum árið høvdu kostað landskassanum, vóru øktu inntøkurnar trektar frá øktu útreiðslunum, og tí var úrslitið á pappírinum "ikki so heilt gali".

Frá netto til brutto

Men nú er aftur farið at ganga tann skeiva vegin við føroyska búskapinum. Í eykajáttanarlógini fyri september 2003 vórðu mettu inntøkurnar lækkaðar 104,7 mió. krónur. Og hvat ger landsstýrið so ? - Jú svarið fingu við í tíðindasendingini hjá Útvarpinum týskvøldið 25. november. Har varð sagt, at eykajáttanarlógin fyri november, við sínum 50 mió. krónum verður størsta eykajáttanarlógin í ár! - Og hvussu kann hon tað, tá lógin fyri september kostaði yvir 100 mió. krónur í mistum inntøkum ? Jú Útvarpið segði soleiðis: "Anfinn Kallsberg sigur, at meirútreiðslurnar samanlagt í ár verða 70 mió. krónur hægri enn figgjarlógin fyri 2003 vísti, tá hon varð samtykt."

- Ja sjálvandi ! Nú minka inntøkurnar hjá landskassanum, og tí er landsstýrið aftur farið at servera bruttotøl. Og soleiðis verður tað helst til inntøkurnar einaferð í framtíðini aftur fara at hækka.

Eingin verður ríkur

Við at brúka nettotøl í uppgangstíðum og bruttotøl í versnandi tíðum, verður úrslitið á pappírinum altíð "hampuliga gott", og soleiðis ber til at fáa Føroya fólk at trúgva, at figgjarstýringin í landinum er "ikki so heilt galin". Men neyvan verður nakar føroyingur ríkur av hesum.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Nú er at brúka Norðurbryggjuna rætt og undir ábyrgd

Jógvan við Keldu
Norðurlandaráðslimur og limur í stýrinum fyri Norðurlendska Mentanargrunnin

At vit eru føroyingar, er ikki nógmikið til at fáa okkara gylta umboðsstovn og okkara sanna mentanarliga flaggskip uttanlands at eydnast.

Nú fyrsta euforiska bylgjan hevur lagt seg eftir upplatingina av Norðurbryggjuni, verður spurningurin, hvussu væl og effektivt – bæði í vinnu og mentan - vit kunnu brúka henda frálíka karm mitt í øllum meldrinum í stórbýinum Keypmannahavn, har fólk í uttanumøkinum eisini savnast.

Hetta kendist sum stórfingin løta, har útnorðurlondini saman við Danmark høvdu tikið lógvatak, har almennir kassar og vinnurekandi samfelt stovnsettu ein útnorðurmið-depil. – Eisini er tungtvigandi, at Ísland er við í átakinum.

Fyri smáum 60 árum síðani vóru øll útnorðurlondini donsk, har Føroyar og Grønland enntá vóru donsk amt.

Komandi ár hevur Ísland verið sjálvstøðugt ríki í 60 ár, og sigast má, at teir eru ein gylt fyrimynd fyri okkum føroyingar.

At lata dygdarvørur

Vit eiga at leggja okkum í geyma, at tá góðskumetingar verða gjørdar innan listina, vinnuna og í samband við fólksliga innihaldið, eru vit ikki at meta øðrvísið enn fólk aðrastaðni.

Tá vit koma út í heim og ætlað nakað, verða vit ikki spurd um vit eru føroyingar, men um vit duga tað, vit takast við.

Rúni Brattaberg, Ernst Sondum og Páll Sólstein, eru ikki komnir inn í tónlistahitan, tí hesir eru føroyingar, men av eini orsøk, nevniliga, at teir duga, tað teir takast við.

Todi er ikki komin so væl fyri, tí hann er føroyingur. Bert ein orsøk er fyri, at hann kann brúkast á FCK, er at hann hevur verið førur fyri at skorað mál.

Mong onnur dømi kundu verið tikin, eitt nú í skaldskapi, í málningalist o.ø.

Ikki hvør - men hvat

Tá eitt nú danir hava málningaframsýningar í útlondum, eru teir ikki "interessantir", tí teir eru danir. Kennarar av listini spyrja bert, um hetta er nakað tey hava áhuga í.

Tá eg í fjør var yviri í ST í New York, kom ein amerikansk kvinna og greiddi mær frá, at hon hevði ein málning av Bárði Jákupssyni hangandi. Ein av hennara vinkonum, hevði lagt ávíst trýst á hana, fyri at fáa hana at selja sær málningin. Eg spurdi, hvussu tað bar til. Hon svaraði sjálvandi: "Hon var so hugtikin av málningunum". Hon tosaði ikki um, hvussu hugtikin hon var av Bárði, ella av at hann var føroyingur.

Tá nú vanligi gerandisdagurin kemur hjá okkara frálíka framsýningar- og umboðsstovni – hesum sanna mentanarliga flaggskipi - ræður um, at breiddin í umboðanini verður har, men so sanniliga eisini, at tær verkætlanir í verða har, eru væl fyriskipaðar, og liggja á ávísum støði listarliga. – Her hugsi eg serliga, tá talan er um at geva okkara listarfólki og mentanarátøkum møguleikar í Danmark og longur úti í heimi. – Her eiga vit kanska eisini at taka okkara "hoyringarbreidd" til viðgerðar.

Norðurbryggjan eitt kærkomið amboð

Verður Norðurbryggjan brúkt á rættan hátt, verður karmurin nýttur undir ábyrgd og átøkini væl fyriskipað "har avgjørt eingir lepar hanga við", eru møguleikarnir óendaliga stórir bæði hjá vinnu og mentan. Ein góð byrjan verður treytin fyri eini sunnari menning. Amboðið – eitt kærkomið amboð - er har.

Eg fari at ynskja, bæði teimum sum til dagliga virka á Norðurbryggjuni og teimum átøkum í verða í framtíðini, góðan byr. – Hjartaliga tillukku.

Politisk upplýsing

Hans J. Hermansen

Á løgtingsins fíggjarlóg verður peningur settur av til politiska upplýsing. Serligar reglur eru fyri, hvussu hesin peningur kann nýtast. Peningurin verður býttur millum løgtingsumboðini í serligum lutfalli eftir, hvussu politisku flokkarnir eru umboðaðir á tingi. Seinastu tingsetuna varð hetta broytt nakað, men kortini fara stóru flokkarnir við bróðurpartinum.

Hetta er í grundini vert at hugsa eitt sindur um. Tað er nógv tyngri hjá einum lítlum flokki at gera vart við seg og síni sjónarmið enn hjá einum størri flokki við fleiri løgtingsumboðum, sum kunnu býta uppgávurnar millum sín. Einsamalla umboðið á løgtingi í tí lítla flokkinum noyðist at renna seg upp í skúm fyri bara at megna ein lítlan part av tí, sum hinir megna.

Spurningurin er í hesum føri, um almenni peningurin fer til politiska upplýsing. Nei, her er talan um partapolitiska upplýsing. Hvør flokkur talar sína søk við almennum peningi. Tað hevði verið ein løgin sjón, um Eidesgaard fór at greiða frá Breckmann og hansara politikki, ella Lisbeth L. Petersen heitti á fólk um at styðja Høgna Hoydal. Og Kári Post hevði neyvan runnið við brøvum, so at tungan hekk úti, fyri at hjálpa Jenisi til nakrar atkvøður.

Skal hetta vera politisk upplýsing við lít, átti alt at verið savnað á einum staði, so at borgarin fekk høvi til at seta seg inn í stevnur flokkanna og støður teirra til ymisk mál. Peningurin til politiska upplýsing byggir ikki á grundsjónarmiðið um fólkaræði.

Spurninur til Høgna Hoydal og Anfinn Kallsberg

Nita Næs

Bæði í úrvarpinum, í sjónvarpinum og í bløðunum hoyra vit um eldraøkið, sum skal leggjast út til kommunurnar at umsita. Eg vil við hesum stutta skrivi, spyrja tykkum báðar, hví so er?

Kunnu tit geva okkum borgarum eina góða grundgeving fyri, hví eldraøkið skal út á kommunurnar?

Hví hetta landsmál skal útflýggjast? Verður tað betri fyri okkum borgarar? Ella, er tað bíligari fyri landið? Ella, er tað tí landskassin manglar tær 300 milliónirnar, sum blokkurin varð skerdur, og tí ikki hevur ráð til vælferðarsamfelagið longur? Ella skal skerdi blokkurin sparast innaftur á eldraøkinum?

Vit boragara mangla eina gjølla grundgeving frá tykkum.

Vit tíma ikki longur at hoyra um tungu almennu økini, sum eina hóttan úr Tinganesi.Tíma ikki longur at hoyra um møguligar kommunusamanleggingar, tí kommunirnar eru ov smáar til umstingarligu byrðuna, sum tær møguliga skulu hava.

Hvar eru hugsjónirnar vórðnar av?

Hví leggja eldraøkið út?

Gott hevði verið, at fingið eitt gjølla svar!

Tað verður tosað ov nógv um støddina av møguligu kommunununu, og ov lítið um politisku hugsjónina, hví almenn væl umsitin øki, skulu tú á kommunirnar!

Tað er tí ein skeiv og ræðandi gongd!

Kommentar til journalist Ingi Rasmussen - Olivant.fo 1/12-2003 "Samkomur og samkynd"

Peter O.K. Olofson

Det er synd, når man ikke kan høre, hvad der bliver sagt, især hvis man som journalist skal gengive andres synspunkter. Nogle gange spørger man sig selv: Er det fordi, man ikke vil høre? I bedste fald har den gode journalist bevidst valgt at lade sin egen holdning skinne igennem i udvælgelsen og fremstillingen af andres holdning. Det var så journalistens holdning, men var det hans opgave at formidle den? Til oplysning kan jeg fortælle, at hovedsynspunktet i mit oplæg var, at vi skulle leve og lovgive efter den i skaberværket givne identitet og bestemmelse som mand og kvinde. Videre pegede jeg på, at hvis man ophæver denne identitet og bestemmelse som mand og kvinde som norm for, hvordan vi skal leve og hvordan vi skal lovgive i vores samfund, og i stedet lægger menneskers drift og lyst til grund, så er der åbnet for et utal af muligheder. Åbner vi ikke for alle disse muligheder, så er det, at vi må spørge os selv, hvad der giver os magt og myndighed til at sige nej til det ene og ja til det andet. Hvad begrunder, at man f.eks. siger ja til homoseksuelt samliv, men nej til pædofile forhold (som der også findes foreninger for), bilifile forhold (som der også findes foreninger for) eller flerkoneri (som f.eks. en del muslimer ønsker, og måske andre), osv.. Det var sammenligningspunktet i mit oplæg, og det står jeg naturligvis ved. Er der sammenhæng i vores argumentation og etisk konsekvens eller ender vi blot i ren vilkårlighed ud fra smag og behag? Det var spørgsmålet. At det også, som det kom frem på mødet, var sådan, at man i kampen for at få legitimeret et anderledes seksualliv, i Danmark havde en forening for bøsser og lesbiske, der indtil 1985 indkluderede pædofile (de blev da udskilt til en selvstændig forening), burde journalisten måske også have fortalt. Og at undertegnede også offentligt sagde, at jeg tog for givet, at de repræsentanter for den nye forening for homoseksuelle, som var til stede, var enige med mig i at sige nej til pædofile forhold (og ingen modsagde dette), lader det til, at journalisten under ingen omstændigheder ville høre. Var det et sagligt informativt referat, der skulle gives, eller hvad ? Bedre held, næste gang. Ønsker nogen kopi af mit oplæg, kan de blot maile til olofson@post.olivant.fo, så skal jeg sende det. Har jeg helt misforstået journalisten ærinde, så må han naturligvis have mig undskyldt på forhånd...